# Breyt rútar og varð handtikin

*Ein maður varð handtikin fyri at hava brotið tríggjar handilsrútar í miðbýnum*

Sveinur Tróndarson

Nógv fólk var í býnum í høvuðsstaðnum um vikuskiftið, og hóast tey flestu vita, at tað er skilabest at fara heim at sova viðhvørt, so er kortini onkur, sum heldur brúkar morgnarnar til at bróta rútar og gera aðrar ónáðir.

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein illur maður gekk í miðbýnum. Hann hevði tá brotið onkran handilsrút so at hann kundi sleppa innar. Tað eydnaðist honum at bróta tríggjar handilsrútar áðrenn hann varð handtikin. Av løgreglustøðini í Havn frætta vit, at maðurin hevur viðgingið seg sekan í ákærunum, og at tey

# Fleiri vespubýlir í Havn

*Niðri á Reyni hava tey funnið tvey vespubýli*

Vit hava næstan havt suðurlendskt veður seinastu tíðina. Sól og summar í ríkiligt mát, og so hevur tað verið so turt, at menn vita ikki um slíkt.

Og hava vit ikki fatað, at summarið er komið til Føroya, so hava vespurnar, sum vit annars bert seta í samband við summaraðrastaðni, leitt okkum á leiðina aftur. Í ár eru nevniliga funnin fleiri vespubýli í Havn.

Í seinastu viku var eitt funnið og í gjáramorgunin, vóru tvey funnin afturat. Hesaferð vóru tað reynbúgvar, sum vóru komin fram á vespubýlini. Hóast vit ikki enn hava eina deild á løgreglustøðini í Havn, sum tekur sær av flogkyktum burturav, so var tað har boðini endaðu í fyrsta umfari.

**st**

# Stjala bilar í Vestmanna

*Seinastu tíðina eru vestmenningar órógvaðir av tveimum ótangum, sum ganga runt, á nátt, og stjala bilar. Og teir smæðast ikki fyri, at fara inn í húsini at leita eftir lyklinum, um so er, at hann ikki stendur í*

Sveinur Tróndarson

Sambært sýslumanninum í Vestmanna er hetta komið fyri fleiri ferðir í seinastuni, og seinast um vikuskiftið. Leygarmorgunin var ein maður í bygdini varugur við, at bilur hansara var stjolin úr túninum um náttina. Bilurin var tó funnin aftur seinni um dagin, men við slitnaðari kopling, greiðir Ivan Klein Olsen, sýslumaður frá.

Tá vit spyrja hann, um tað er eitt vanligt fyribrigdið í Vestmanna, at bilar vera stjolnir, sigur hann, at tað hevur tað verið í seinastuni. — Nú skal tað ikki skiljast, sum at tað hendir hvørt vikuskiftið, men her eru tveir mans í bygdini, sum ganga runt og stjala bilar frá fólki um náttina. Tað líkist ongum, at uppføra seg soleiðis, og vit fáa so at siga einki gjørt við tað, sigur sýslumaðurin, sum heldur at revsingin ótangarnir fáa, er alt ov lin. — Tað er í veruleikanum eitt herðaklapp teir fáa, og tað líkist ongum, heldur hann.

Sambært sýslumanninum í Vestmanna, so er einki mark fyri frekleikanum hjá tjóvunum. — Teir »lána« ein bil úr onkrum túni, og finna teir ikki lyklarnar í bilinum, so er ikki óvanligt, at teir fara innar í húsini, finna lykilin og stinga av við bilinum. Tá teir eru lidnir við bilin, seta teir hann aftur og teir eru enntá so frekir, at teir fara inn aftur við lyklinum, sigur hann.

*Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins:*

# – Almennu Føroyar kundu fingið nógv meira burtur úr

*- um vit høvdu kravt borið alment oljufelag við í øllum loyvunum. Stóri áhugin fyri føroyaøkinum prógvar, at hetta hevði ikki verið nakar trupulleiki.*



Edmund Joensen

Jan Müller

-Tað er gleðiligt, at tað er stórur áhugi fyri Føroyum. Men tá tað hevur verið sagt, at vit frá føroyskari síðu ikki mugu seta oljufeløgunum ov stór krøv, tí so vórðu feløgini ikki áhugað, so hevur hetta verið ein vanlukka fyri okkum. Tað er gjørt til einkis av tí ovurstóra áhuganum, sum verið hevur sigur Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins eftir handanina av leitiloyvum í Norðurlandahúsinum seinasta hósdag. Hann vísir á, at nettupp hesin áhugin prógvar, at føroyingar áttu at kunnað fingið borið alment oljufelag við í øllum útbjóðingunum. Tað hevði gingið sum smurt at sett slíkt krav sigur hann.

Tað sær hann tí sum tað mest negativa við hesum degnum. Tann tann tryggasti mátin at tryggjað almennu Føroyum part av oljuinntøkum hevði verið okkara egna almenna luttøka gjøgnum borin feløg.

Edmund Joensen sigur, at tað er jú kent, hvør fer við vinningunum frá oljuframleiðslu, nevniliga oljufeløgini, og í hesum føri kundu Føroyar havt møguleika at verið við í tí stóra vinninginum, men tann møguleikan góvu vit frá okkum við eingi slík krøv at seta.

Fyrrverandi sambandsløgmaðurin, sum í fleiri ár umsat oljumál, hevur alla tíðina verið fyri almennari luttøku í oljuvinnuni, og hann heldur ikki, at privatu føroysku oljufeløgini muna nakað í mun til um vit høvdu tað almenna borið við.

-Tað er eitt øgiligt spell og eitt stórt tap fyri føroyska samfelagið, at vit ikki hava kravt borna luttøku í øllum loyvum.

-Nú er tú av fleiri mettur sum tann, ið forðaði fyri eini semju við bretar. Um tú skuldi rátt í hesum málinum, hevði vandi so ikki verið fyri, at vit als onga útbjóðing høvdu havt - tí marknatrætan framvegis hevði verið óloyst?

- Marknatrætan hevði helst verið loyst við einum betri úrsliti enn tí vit fingu, um gjørt var eftir politikkinum hjá Sambandsflokkinum. Í tí semjuni, sum varð gjørd, varð ov nógv latið til bretar, ja eitt øki, sum er líka stórt sum Føroyar og sum var púra óneyðugt at lata, lótu vit fara. Tað vistu vit frammanundan og eftir tað hava bretar eisini viðgingið, at vandin fyri, at teir fóru til Haag, hann var ikki til staðar. Tí meti eg økið, sum vit nú ikki hava atgongd til, at verða latið bretum óneyðugt.

Edmund Joensen vísir á, at undir marknasamráðingunum var landssynningshornið tað mest heita økið, og tað er so tað, sum vit hava slept fyri ein stóran part og tí ikki kunnu hava við í útbjóðingini.

Formaður sambandsfloksins sigur víðari, at eisini í sambandi við semjuna um fiskiøkið hava vit gjørt eitt stórt mistak. Vit lótu bretum í gávu norðasta partin av tí økinum, sum er felags fiskiøki. Úrslitið verður, at boripallar koma at standa inni á føroyskum landgrunni, men sum er altjóða hav at fiska í.

# Sleppa at selja vatnið í oktober

*Í oktober fer Vinnumálastýrið at gera av, hvør fær rættindini at gagnnýta reina kelduvatnið úr Sumbiarbergholinum*



*Í oktober fer at bera til at tappa og selja vatnið úr Sumbiarbergholinum*

John Johannessen

2. oktober er freistin úti at søkja um loyvi at gagnnýta reina kelduvatnið úr Sumbiarbergholinum til vinnuligt endamál.

Vinnumálastýrið lýsti í endanum av juni mánaði í bløðunum, at nú kundi søkjast um loyvi at selja vatnið. Men kortini hevur Vinnumálastýrið enn onga umsókn fingið á borðið.

Úr Vinnumálastýrinum verður sagt, at áðrenn lýst varð eftir umsóknum fekk stýrið fleiri fyrispurningar um at sleppa at tappa vatnið úr bergholinum.

Hesir fyrispurningar uppfylla kortini ikki allar tær treytir, kravt verður í lýsingini. Tí hevur Vinnumálastýrið gjørt teimum áhugaðu vart við, at tey skulu søkja av nýggjum, ætla tey sær at fáa loyvi. Tískil roknar Vinnumálastýrið við at fáa fleiri umsóknir, áðrenn freistin er úti.



# Manningin á »Kursk« sannleikans prísur



*Allur heimur hevur fylgt við óhugnaliga sjólátinum í Barentshavinum*

*Vanlukkan í Barentshavinum hevur víst russiska fólkinum, hvønn týdning ein fræls tíðindatænasta hevur. Og hon eigur samstundis at hava lært russisku leiðsluna, at tíðin er farin frá tí dulda sannleikanum.*

Árni Joensen

Russiska fólkið fekk tíðliga í gjáramorgunin gleðiboð uttan úr Barentshavinum:

- Tað er eydnast norskum djúpvatnskavarum at lata ta ytru neyðlúkuna har afturi á kavbátinum „Kursk“ upp, og nú er ætlanin so at lata ta innaru lúkuna upp. Tann royndin verður fyrrapartin í dag.

Á middegi fekk russiska fólkið aftur boð uttan úr Barentshavinum:

- Norskir og bretskir djúpvatnskavarar hava eftir kanningar fyrrapartin slept ætlanini at lata ta innaru neyðlúkuna har afturi á „Kursk“ upp. Rúmið innan fyri lúkuna er fult í sjógvi, og bjargingarroyndin er steðgað.

Eftir sat russiska fólkið og hugsaði um tað, sum var farið fram í Barentshav-inum. Ikki so nógv um sjálvan tilburðin næstseinasta leygardag, tá „Kursk“ sakk, men heldur um tað, sum var hent - ella kanska ikki hent - dagarnar eftir tilburðin. Fólk hugdu spyrjandi hvør upp á annan: Hví? Ikki hví kavbáturin sakk, men heldur hví landsins myndugleikar drálaðu so leingi við at taka av tilboðnum um hjálp uttaneftir.

Og seinasti spurningurin er ikki settur enn.

**Hví?**

Alla seinastu vikuna hava russar lisið og hoyrt um vanlukkuna í Barentshavinum. Og neyvan nakrantíð hevur russiska fólkið verið so samt við landsins fjølmiðlum, sum sanniliga ikki hava lagt fingrarnar ímillum, tá teir hava viðgjørt „Kursk“-vanlukkuna. Útvarp, sjónvarp og bløð hava sett ein spurningin fyri og annan eftir, og serliga hava flotaleiðslan og ábyrgdarmaðurin fyri allari russiku hermegini, Vladimir Putin, forseti staðið fyri skotum.

Hví segði flotaleiðslan ikki sannleikan beinanvegin, men bíðaði í tveir dagar við at siga frá tilburðinum? Hví segði flotaleiðslan, at „Kursk“ var sokkin eftir samanstoyt við annað far? Hví viðgekk flotaleiðslan ikki beinanvegin, at kavbáturin var sokkin av einari ella tveimum spreingingum? Hví viðgekk flotaleiðslan ikki beinanvegin, at hon hevði ikki útgerð til at bjarga teimum 118 monnunum umborð á tí sokna kavbátinum? Hví bað flotaleiðslan ikki umheimin um hjálp beinanvegin?

Og forsetin Valdimir Putin. Hvussu bar tað til, at forsetin helt fram at halda summarfrí við Svartahavið heldur enn at taka ta neyðugu avgerðina? Ella var tað veruliga so, at flotaleiðslan duldi ein part av sannleikanum fyri forsetanum?

**Eisini gagnlig**

Hvat nú fer at henda í Russlandi, veit eingin, men vanlukkan í Barentshavinum hevur í hvussu er lært ta fyrr so máttmiklu flotaleiðsluna og sjálvan forsetan, at tann tíðin er farin, tá tann hernaðarliga og tann politiska skipanin sjálvar gjørdu av, hvussu ein sannleiki skuldi sigast fólkinum.

Vanlukkan við „Kursk“ hevur víst russisku leiðsluni og ikki minst russiska fólkinum, hvussu ein fræls tíðindatænasta virkar, og hvønn týdning hon hevur. Fyri umheiminum hevur vanlukkan víst, at russiska tíðindatænastan hevur fylgt nýskipanunum í landinum, men at tað gamla framvegis er galdandi innan landsins leiðslu - í hvussu er tað hernaðarligu.

Men vanlukkan við „Kursk“ kann kanska gerast tann tilburðurin, sum eisini fær sannført russisku leiðsluna um, at tað dugir ikki at siga sannleikan á annan hátt enn tann veruliga. Í so máta kemur vanlukkan ivaleyst eisini at hava nakað gagnligt við sær.

# Allir sjólótust umborð á Kursk

Stefan í Skorini

Á middegi í gjár góvust bjargingarmenninir við royndunum at koma inn í skrokkin á Kursk. Kavbáturin var fullur av vatni, og tí brast seinasta vónin um at finna nakran á lívi.

- Sjógvur var innanfyri neyðlúkuna, tá ið hon varð latin upp. Eingin av manningini varð funnin, og norsku kavararnir funnu einki tekin um lív, søgdu umboð fyri russiska flotan í gjáramorgun, men bjargingarroyndirnar hildu tó fram.

Kavararnir gjørdu so enn eina roynd at lata ta næstu lúkuna upp, men vónirnar um at finna nakran á lívi vóru ikki góðar, tí so long tíð var fráliðin. Kavbáturin sakk næstseinasta leygardag, tá ein spreinging var umborð á Kursk, sum siglir við kjarnorku.

Í gjár varð avgerð tikin um, at bara norskir kavarar skuldu niður á Kursk og ikki tann bretski undirvatnsbáturin LR5.

Kavararnir arbeiddu síðani í trímansbólkum, sum kundu kava í seks tímar hvørja ferð, áðrenn teir noyðast uppaftur. Soleiðis kundu teir tólv kavararnir arbeiða alt samdøgrið fyri at bjarga onkrum av manningini, sum møguliga enn var á lívi . Tað er Forsvarskommando Nord-Norge, sum hevur havt ábyrgdina av bjargingararbeiðnum seinastu tíðina.

Tá kavararnir so komu niður á Kursk fyri middag í gjár, bar til hjá teimum at staðfesta, at sjógvur var innanfyri neyðlúkuna, og tí var eingin vón um at finna nakran á lívi.

Spreingingin umborð á Kursk næstseinasta leygardag hevði við sær, at kavbáturin sakk, men nakrir av manningini, sum taldi 118 mans, vóru enn á lívi eftir óhappið. Bjargingararbeiðið hevur tó gingið sera striltið, tí veðrið ikki hevur verið til vildar at fremja nakað munagott bjargingararbeiði.

Kursk er ein lutfalsliga nýggjur kavbátur, sum varð tikin í nýtslu av russiska herinum í 1994, og hann kann hava 24 kjarnorkurakettir umborð. Hann er gjørdur til at vera undir vatni í 120 dagar og kann fara niður á 500 metra dýpi. Kursk er 154 metrar til longdar. Tað er fleiri ferðir komið fyri, at kavbátar hjá russiska herinum er soknir, og nógvir mans hava mist lívið seinastu árini í slíkum vanlukkum.

